# Anitra og Göran í Føroyum

*Fríggjadagin komu svensku forsætisráðharrahjúnini á almenna vitjan í Føroyum. Tey fóru avstað aftur sunnudagin*



Sørens Chrstensen, ríkisumboðsmaður, bíðar eftir Göran Persson og fylgi. Sunnumorgunin kl 10 hittust ríkisumboðsmaðurin og svenski forsætisráðharrin á fundi

Mynd: Eirikur Lindenskov





Undir Vestmannabjørgunum fríggjadagin. Siglt varð norður um oyggjarnar av Oyrargjógv til Klaksvíkar

Mynd: Báður Lydersen



Á veg av Amtmansborgini út í Tinganes spákaðu Göran Persson og fylgið í gomlu Havnini. Göran Persson bað tá um at sleppa at síggja Havnar Kirkju. Hetta var beint fyri kirkjutíð, og fólk var komið í kirkju. Umframt svensku gestirnar, sæst eisini Jógvan Ki Jacobsen á myndini

Mynd: Eirikur Lindenskov



Maiken Poulsen á Løgmansskrivstovuni greiddi svensku gestunum frá um gomlu Havnina

Mynd: Eirikur Lindenskov



Løgmaður greiðir Anitru Steen og Göran Persson, hvussu føroyingar hagreiða skerpikjøt og turran fisk, meðan Bjørn á Heygum, svenskur konsul, og Anita, kona løgmann, lýða á

Mynd: Eirikur Lindenskov



Vitjan Görans Perssons er av. Um middagsleitið sunnudagin fór fylgið aftur á flogvøllin. Løgmansskrivstovan eigur onga limusunu. Hendan var leigað frá Bilasølani í Hoyvík

Mynd: Eirikur Lindenskov